# Síðsta orðið er neyvan sagt

**Skipara- og navigatørfelagið ætlar ikki at tiga um tilburðin, tá Norrøna sigldi á land**



*Norrøna rendi á land 15. januar 2004. Síðsta orðið í málinum er sagt enn.*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

TRÆTA

*Heri á Rógvi*
*heri@sosialurin.fo*

Ólavur Hóvsgarð og hansara fakfelag, Skipara- og navigatørfelagið, latið ikki málið um óhappið hjá Norrønu liggja. Málið byrjaði 15. januar 2004, og tað endar eftir øllum at døma ikki enn, hóast Fiskimálaráðið ikki ætlar at gera meira við málið.

– Eg eri ikki nøgdur, men eg haldi meg til felagið og latið felagið føra sakina, sigur Òlavur Hóvsgarð sum tað einastu viðmerkingina til Sosialin.

Ellintur Abrahamasen, formaður fyri Skipara- og navigatørfelagið, sær tríggjar møguleikar fyri sær: At klaga um málsviðgerðina til løgtingsins umboðsmann, eitt rættarmál ella at fáa landsstýrið at seta ein óheftan stovn at gera ein meting.

– Tað síðsta orðið frá okkum er neyvan sagt enn, sigur Ellintur Abrahamsen. Kjarnin í málinum fyri Skipara- og navigatør felagnum er spurningur um, hvørt Òlavur Hóvsgarð gjørdi tey mistøk, ið frágreiðingin hjá Skipaeftirlitinum staðfestir.

Roknað verður við, at Skipara- og navigatørfelagið fer at taka eina støðu í komandi viku.

# Føroya nevndin til Føroya

**Føroya manningin hjá fólkatinginum ætlar sær til Føroya**

VITJAN

*Heri á Rógvi*
*heri@sosialurin.fo*

Tey útvaldu í serligu Føroya nevndini hjá fólkatinginum koma til Føroya í august. Vitjanin verður í døgunum 16. til 18. august. Føroya nevndin plagar at vitja í Føroyum við jøvnum millumbili. Nevndin var seinast í Føroyum fyri tveimum árum síðani, men nevndin hevur ikki verið í Føroyum, síðani hon varð mannað av nýggjum eftir seinasta fólkatingsval.



*Pia Larsen er enn sum áður formaður fyri 21-manna nevndina hjá fólkatinginum*

*Mynd: Jens Kristian Vang.*

Nevndin kallast 21-manna nevndin viðvíkjandi Føroyum, men Atlantic Airways fær neyvan ein ordra upp á einogtjúgu ferðaseðlar frá ferðaskrivstovuni hjá fólkatinginum. Fleiri fólkatingsnevndir eru á ferð um hetta mundið, og fólkatingslimir eru oftani limir í meira enn bert tí einu nevndini.

Tað er Ríkisumboðið, ið fyriskipar ferðina. Vit hava ikki kunnað fingið uppspurt skránna, ella hvør kemur við. À vitjanini fyri tveimum árum síðani kunnaði nevndin seg um føroysk viðurskifti, m.a. á fundum við løgtingsfólk, landsstýrisfólk og umboð fyri vinnulívið. Fleiri av limunum tá høvdu ikki verið í Føroyum áður.

Eingin politisk avgerð varð tikin á túrinum, men vitjanin var meira kunnandi og óhátíðarlig.

Føroyanevndin er mannað við umboðum úr Konservativ Folkeparti, Venstre, Socialdemokratiet, Det Radikale Venstre, Enhedslisten, Socialistisk Folkeparti, Dansk Folkeparti og Høgni Hoydal úr Tjóðveldisflokkinum er eisini limur í nevndini. Pia Larsen úr Venstre er formaður, og Frank Jensen úr Socialdemokratiet er næstformaður.

# Mentanartiltak á Støðni í Rituvík

**Tíðindaskriv**



Leygarkvøldið 16. juli kl. 19.00 verður áhugavert mentanartiltak á Støðni í Rituvík (Eystara lendingin).

Á mentanartiltakinum luttaka m.a. Rúni Brattaberg, kona hansara Susanne og Kór Glyvra Kirkju. Eisini verður felagssangur og Dánjal Petur Højgaard heldur røðu. Borgarstjórin í Runavíkar kommunu, Rodmundur Nielsen, bjóðar vælkomin.

Møguleiki verður at keypa sær mat, ið verður grillaður á staðnum.

Klokkan 21.00 kunnu tey, ið hava hug, fara til gongu eftir varðagøtuni úr Rituvík til Lambar. Við gróthúsini verður støðga á til eina hugnaløtu við sangi og søgum. Komin til Lambar verður suppa at fáa í skúlanum.

Øll eru vælkomin !

## Kim »Elton John« Hansen í Rex

Your song, Sorry seems to be the hardest word, Crocodile rock, Candle in the wind og øll hini hittini hjá Elton John kunnu fríggjakvøldið upplivast í Rex Culture Club, og hóast talan ikki er um Elton John sjálvan, so hevur sangarin í Elton John Jam langt síðan sligið sítt navn fast, sum tann føroyski Elton John.

Tá Kim Hansen í byrjanini av 90'unum fyrstu ferð gjørdi um seg á føroyska tónleikapallinum, við bólkunum Jóannes og co. og seinni Kim og co., átti Elton John altíð stóran lut í skránni.

Tá Princess Diana doyði, spældi Kim sína egnu tolking av umskrivingini av Candle in the wind í útvarpinum, áðrenn Elton John hevði framført lagið. Hetta gjørdist eitt verulig útvarpshit í Føroyum. Nú stendur Kim so á odda í Elton John Jam, og aftan fyri honum standa hinir í Showmonnum.

**nud**

## Finalan í Ársins Songrødd 2005



**Leygarkvøldið tann 16. juli fer stóra finalan í Ársins Songrødd 2005 av bakkastokki í Mentanarhúsinum í Fuglafirði. Í sambandi við finaluna verður skipa fyri hip hop nátt í Fuglafirði**

*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Tiltakið byrjar klokkan 23.30, og lagt er upp til eina spennandi finalu við sera góðum røddum og framførslum hjá teimum 5 finalistunum, sum nú skulu kappast um heitið sum besta føroyska røddin í ár.

Hetta er ikki eitt heitið uttan týdning, tí áður hava kend nøvn, sum Eivør Pállsdóttir, Guðrun S. Jacobsen, James Olsen, Malan Eyðunsdóttir og Sólva Ford vunnið sama heiður.

Vónandi kann Ársins Songrødd aftur í ár verða ein lopfjøl hjá luttakarunum út á yrkistónleikapallin, eins og kappingin hevur verið tað so mangan fyrr.

Seks finalistar hava sungið seg til finaluna, og eru tey: Eydna av Fløtum, Hilda Kjølbro, Nicolina M. Midjord, Evi Halsdóttir, Hedavik N. Jespersen og Jóannes Lamhauge.

Ragnhild Ellingsgaard, sum vit kenna frá ýmsum sendingum hjá Útvarpi Føroya, verður frásøgufólk undir kappingini, meðan Elin í Stórustovu skipar fyri hip-hop nátt í Mentanarhúsnum. Har verður hip hop diskotek. Eisini koma J´z (Julian & Jacob) at rappa, »B´n´W -Crew« fara at dansa hip hop, og so fara teir báðir funky hip-hop handlarnir X-Size & Basics hava street-mótashow.

Í sambandi við tiltakið koyra bussar til og frá Mentanarhúsinum. Vilt tú vita meira um hesa bussarnar, so ring á tel 21 77 52 (Vestmanna/-Vágar), 21 64 64 (Tórshavn) ella 50 52 20 (Eysturoy).